FYLGISKJAL 12

LM-072/2025

Heilsustýrið

Heilsustýrið
Óðinshædd 11, 1. hædd hm.
100 Tórshavn

(+298) 30 90 60
hst@hst.fo
www.hst.fo

22. oktober 2025
Mál: 25/26031-2
Viðgjørt: Berit L. Larsen

Hoyringarsvar viðvíkjandi uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (berarakanning)

Heilsustýrið ger vart við, at, tað er sera umráðandi, at tað nágreiniligt verður ásett og lýst hvussu manngongdin í samband við berarakanning skal vera. Hetta antin í kunngerð ella í lógini. Hetta skal fevna um alt frá kunning um tilboð til datagoymslu. Eisini skal gerast mannagongd viðvíkjandi dátuvernd.

Heilsustýrið mælir til, at § 6 b, stk. 2 verður broytt til, at: Landsstýrisfólkið kann eftir tilmæli frá Heilsustýrinum, áseta reglur um, hvørjar ílegusjúkur tilboðið, sambært stk. 1, fevnir um. Heilsustýrið skal hoyra Sjúkrahúsverkið í hesum.

Vit mæla eisini til, at tað stendur í lógini, sum § 6 b, stk. 3, at Landsstýrisfólkið ásetur nærri mannagongdur í samband við berarakanning. Harumframt skal ein yvirskrift vera viðvíkjandi § 6 b, við heitinum: Berarakanning.

Tað er av týdningi, at gera eftirmeting av skipanini, tá hon hevur virkað eina tíð.

Tað stendur um avleiðingarnar av uppskotinum, at tað koma ikki at vera umsitingarligar avleiðingar. Hetta er Heilsustýrið ikki samd í. Tað koma at vera umsitingarligar avleiðingar at seta hetta í verk.

Heilsutýrið vil eisini gera vart við, at allar dátur í samband við berarakanning skulu goymast í genomskránni.

Vinaliga

Guðrið Andorsdóttir
Virkandi stjóri

Heilsustýrið
Heilsustýrið/Faroese Health Authority
Óðinshædd 11, 1. hædd hm
FO-100 Tórshavn
+298591020
gudrid@hst.fo
https://www.hst.fo